# Handverk av sonnum handverksmeistarum

Vit spæla sovorðnan merkiligan tónleik fyri tykkum í kvøld, segði Leivur Thomsen tá hann bjóðaði áhoyrarunum vælkomnum á konsert hjá Plúmm.

Umleið 20 áhoyrarar høvdu leitað sær oman í Meiaríið, at lurta eftir merkiliga tónleikinum. Hesir fingu eina frálíka ferð gjøgnum fussións jass, standard, funk, soul og blús. Handverkið var í hásæti. Tað var stuttligt at hoyra eina konsert, har reyp er í lagið, og gott handverk bara er ein dygd. Har vóru soloðir av alskins slagi, og krás fyri kræsin oyru.

## Av bestu handverkarum

Rógvi á Rógvu, Arnold Ludvig, Magnus Johannesen og James Olsen luttóku allir í Prix finaluni í saman við Eyðun og Terja. Teir hava seinasta mánaðin lagt oyra til nógv um handverk og hjarta. Á Atlantic Music Event svaraðu handverkararnir aftur við einum stílfullum prikið. Prikið fall í góða jørð hjá flest øllum, uttan teimum sum vóru prikaðir. Men hetta er kanska ikki so løgið. Tað er altíð stuttligari at prika enn at verða prikaður.

Við sær á Meiarínum høvdu teir ein av bestu handverkarunum innan gittarspæl í Norðanlondum: Leiv Thomsen.

## Gittarin fremst

Meiaríið er vorðið eitt av bestu konsertstøðunum í landinum. Ljóðið var framúr gott. Pallurin var ein pyntaður sandkassi og sá ordiliga gott út.

Konsertin byrjaði uttan James. Leivur stóð einsamallur fremstur á pallinum. Meðan Rógvi, Arnold og Magnus løgdu botn undir gittaran, sum var høvuðsljóðførið í lagnum,Gróður. Leivur hevði skrivað lagið.

## Ógvuslig eind

Leivur hevði eisini skrivað næsta lag, Not quite. Hetta var eitt av teimum meira merkiligu løgunum. Lagið var harligt á ein lekran máta. Eitt lag, sum tú noyddist at hava eina meining um. Ljómborðini hjá Magnus og gittarin hjá Leivur funnu saman í eini ógvusligari eind. Leivur vant tónar úr gittaranum. Framførslan varð øðiliga orkumikil hesa løtuna.

## Reyp

Arnold hevði skriva triðja lagið, I feel better. Arnold byrjaði sera hóskandi við eini langari basssolo. Magnus tók yvir og spældi ljómborð solo. Síðan tók Leivur spakuliga yvir við gittarsolo, áðrenn Rógvi endaði við trummisolo. Eitt reyputt lag, men tað var í lagi og áskoðarnir elskaðu tað.

## Tramp og nótastativ

Leivur hevði skrivað tey næstu trý løgini. Gruvutta og ráða Alien Nation, har tramp og nótastativ gjørdust rytmisk ljóðføri. Tað sveimandi og løgna lagið Cuth, sum hevði ein garrvillan enda. Og Relief, sum var samstundis vakurt og rátt.

## Ein showmaður

James kom á pallin og konsertin varð ongantíð tann sama aftur. Stílurin varð ein heilt annar. Standard jassur, funk og soul. Men enn við nógvum soloum og longum istrumentalum pettum.

James segði áðrenn konsertina, at songrøddin ikki var heilt í topp, tí hann sang ikki so nógv longur. Eg havi hoyrt James sungið betur enn fyrstu løgini. Men hann var ómetaliga stuttligur, og dugdi ótrúliga væl at undirhalda, ein sannur showmaður.

Lagið Journey to Iceland hjá Tómas R. Einarsson varð tillagað til føroysk viðurskifti, og var ein uppliving.

## ba ba ba ba za zadan

Næsta lagið við James var uttan iva hæddarpunktið á konsertini. James hevði sungið seg heitan, og ljóðaði væl. Lagið, If you want me to stay hjá Sly & the Family Stone, hóskaði fullkomiliga til hendan bólkin. James var ein karismabumba, og Leivur spældi bestu solo á kvøldinum. Tá James so at enda sang ein sangsolo: ba ba ba ba za zadan, var hesin ummælarin heilt seldur.

## Duett við sær sjálvum

**Løgini:** Distracted hjá Al Jarreau, Sunny hjá Stevie Wonder, og traditionella blúslagið Little school girl. Hitaðu røddina hjá James upp, og hann gjørdist alsamt betur. Í Sunny var so nógv ekko á røddini, at James sang duett við sær sjálvum.

Konsertin endaði við einari rættuliga egnari útgávu av Wonderfull World hjá George David Weiss og Bob Thiele. James ljóðaði sum um Isaac Hayes í høvuðsleiklutinum á 90 ára føðingardegnum. Ein merkiligur endi á eini merkiligari konsert. Hesin ummælarin sat eftir við tankunum, hvar steðgar handverki og hvar byrjar hjarta. Er ikki alt handverk í síðsta enda?

**Hvar sært tú helst James, aftan fyri ella framman fyri trummurnar?**

**Kim, 33 ár, Tórshavn**
Eg síggi hann helst báðumegin. Hann er ein »feitur« entertainari, ein fínur showmaður báðumegin. Hann er bara ólukksáliga stuttligur. Eg kann ikki velja tað eina fram um hitt.

**Búi, 26 ár, Reykjavík**
Eg síggi hann helst alla staðni. Hann er ein pissifeitur trummisláðari og pissifeitur sum frontmaður. Men eg kundi hugsa mær at sæð hann meira í front. Eg kundi hugsa mær at sæð hann á fleiri sovorðnum tiltøkum. Hann spælir alt ov nógv til dans.

**Finnur, 37 ár, Tórshavn**
Tað er faktiskt líkamikið – Tí tá hann spælir trummir ljóðar tað, sum um trummurnar syngja, og tá hann syngur ljóðar tað næstan, sum tá hann spælir trummur.

---

# Russ Taff aftur til Føroya

**Í juni mánaði kemur amerikanski gospelsangarin Russ Taff til Føroya at hava tríggjar konsertir. Saman við honum er ein songkvinna, sum hevur verið nógv frammi í USA seinastu tíðina**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Minni enn eitt ár eftir, at hann vitjaði Føroyar fyrstu ferð, kemur amerikanski gospelsangarin Russ Taff aftur til Føroya at hava framførslur.

Russ Taff var eitt av høvuðsnøvnunum á G! Festivalinum í fjør, men ein góðan mánað áðrenn næsta G! Festival er Russ Taff aftur í Føroyum.

– Eg varð spurdur, um eg kundi royna at fáa Russ Taff aftur til Føroya at syngja. Eg havi havt gott samband við hann, og tá eg ringdi til hann, var hann beinanveg til reiðar at koma aftur hendan veg, sigur Jákup Zachariassen.


*Russ Taff vitjar aftur í Føroyum*

Hann var ein av teimum føroysku tónleikarunum, sum spældi saman við Russ Taff í fjør, og hann verður aftur hesaferð í bólkinum hjá amerikanaranum.

## Tríggjar konsertir

Russ Taff fer at hava tríggjar konsertir í Føroyum, og saman við honum verður ein songkvinna, sum hevur verið nógv frammi í USA, eftir at hon hevur givið fløguna God On A Mountain út.

Talan er um Lynda Randle, og bæði hon og Russ Taff hava sungið saman við Gaiter-fólkunum.

Í næstum fara tey at hava tríggjar felags konsertir í Føroyum. Tann fyrsta verður í Kelduni í Skálabotni 24. juni, tann næsta í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn 25. juni, og sunnukvøldið 26. juni syngja Taff og Randle í KÍ-høllini í Klaksvík.

– Kvøldini verða eitt sindur øðrvísi enn hansara konsert á G! Festivalinum. Hesaferð verður tað ikki so nógv rock n' roll, men heldur meira meira gospel, soul og felagssangur, sigur Jákup Zachariassen.

## Føroyskur bólkur

Russ Taff og Lynda Randle fara at hava føroyskar tónleikarar og sangarar at stuðla sær á konsertunum.

Í bólkinum, sum fer at spæla undir, eru Óli Poulsen, Hans Poulsen, Jan Zachariassen, Kim Hansn, Jákup Zachariassen og James Olsen.

Harafturat fara nógvir føroyskir sangarar at vera við í einum kóri, sum skal stuðla sanginum á konsertini. Millum kórsangarnar verða Heini Lützen, Anna Háberg, Laila Carlsen og kórið Salt.

Russ Taff og Lynda Randle fara at syngja hvør sær og saman, og áhoyrararnir sleppa eisini at tríva í onkran sang saman við teimum.


*Lynda Randle fer at syngja saman við honum*